**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Swimming Association
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Norrøna Svimjisambandið (NSF)
Ligue Européenne de Natation (LEN)
Fédération Internationale de Natation (FINA)

Svimjisamband Føroya bjóðar hervið til

# Aldursbólkameistarastevnu 2021



| | |
|---|---|
| **Dagfesting**: | 30. apríl - 2. mai 2021 |
| **Svimjihøll**: | Klaksvíkar Svimjihøll |
| | 6 x 25m innandura svimjihylur |
| **Adressa**: | Waagsteinsgøta, FO-700 Klaksvík |
| | www.svim.fo |
| **Luttakarar**: | Øll sum hoyra til bólk 1, 2, 3 og 4 hjá SSF |
| | Sí Reglugerð um bólkabýti og Reglugerð fyri Meistarastevnur |
| **Innboðin feløg**: | FLOT, Fuglafjarðar Svimjifelag, Havnar Svimjifelag, |
| | Reysti, Suðuroyar Svimjifelag, Ægir |

**í samstarvi við**

ATLANTIC AIRWAYS

## Stevnupartar

| | |
|---|---|
| 1. partur: | Fríggjamorgun 30. apríl frá kl 09:30 - Beinleiðis finalur |
| 2. partur: | Fríggjadag 30. apríl frá kl 17:00 - Beinleiðis finalur |
| 3. partur: | Leygarmorgun 1. mai frá kl 09:30 - Beinleiðis finalur |
| 4. partur: | Leygardag 1. mai frá kl 17:00 - Beinleiðis finalur |
| 5. partur: | Sunnumorgun 2. mai frá kl 09:00 - Beinleiðis finalur |
| 6. partur: | Sunnudag 2. mai frá kl 15:30 - Beinleiðis finalur |

Høllin letur upp til upphiting 1½ tíma áðrenn hvønn stevnupart, sunnudag tó 1 tíma áðrenn

## Tekniskir fundir

Tekniskur fundur fyri dómarar er í svimjihøllini 1 tíma áðrenn hvønn stevnupart

Tekniskur fundur fyri venjarar er í svimjihøllini 1½ tíma áðrenn fyrsta stevnupart

## Kappingarskrá

| Dagur 1 | Dagur 2 | Dagur 3 |
|---|---|---|
| 1. 200 frí gentur B2-4 | 15. 50 bringa gentur B1-4 | 27. 50 frí gentur B1-4 |
| 2. 200 frí dreingir B2-4 | 16. 50 bringa dreingir B1-4 | 28. 50 frí dreingir B1-4 |
| 3. 100 bringa gentur B2-4 | 17. 100 frí gentur B1-4 | 29. 200 rygg gentur B3-4 |
| 4. 100 bringa dreingir B2-4 | 18. 100 frí dreingir B1-4 | 30. 200 rygg dreingir B3-4 |
| 5. 100 rygg gentur B2-4 | 19. 100 firvald gentur B2-4 | 31. 200 bringa gentur B3-4 |
| 6. 100 rygg dreingir B2-4 | 20. 100 firvald dreingir B2-4 | 32. 200 bringa dreingir B3-4 |
| - døgverðasteðgur - | - døgverðasteðgur - | - døgverðasteðgur - |
| 7. 50 firvald gentur B1-4 | 21. 400 blandað gentur B3-4 | 33. 100 blandað gentur B1-4 |
| 8. 50 firvald dreingir B1-4 | 22. 400 blandað dreingir B3-4 | 34. 100 blandað dreingir B1-4 |
| 9. 200 blandað gentur B3-4 | 23. 50 rygg gentur B1-4 | 35. 400 frí gentur B3-4 |
| 10. 200 blandað dreingir B3-4 | 24. 50 rygg dreingir B1-4 | 36. 400 frí dreingir B3-4 |
| 11. 800 frí gentur B4 | 25. 4x100 frí gentur B3-4 | 37. 200 firvald gentur B3-4 |
| 12. 800 frí dreingir B4 | 26. 4x100 frí dreingir B3-4 | 38. 200 firvald dreingir B3-4 |
| 13. 4x50 frí gentur B1-4 | | 39. 4x50 blandað gentur B1-4 |
| 14. 4x50 frí dreingir B1-4 | | 40. 4x50 blandað dreingir B1-4 |

Á 400 og 800 metra teinunum verður luttøkan avmarkað til 1 riðil fyri hvønn aldursbólk og hvørt kyn, har tað í 800 frí so aftur er bara tann eini aldursbólkurin.

ATLANTIC AIRWAYS

## Aldursbólkar

- Bólkur 1: Gentur føddar í 2014 ella seinni, Dreingir føddir í 2013 ella seinni
- Bólkur 2: Gentur føddar í 2012 ella 2013, Dreingir føddir í 2011 ella 2012
- Bólkur 3: Gentur føddar í 2010 ella 2011, Dreingir føddir í 2009 ella 2010
- Bólkur 4: Gentur føddar í 2008 ella 2009, Dreingir føddir í 2007 ella 2008

Bolkarnir kunnu verða savnaðir í sama riðil. Úrslit og heiðursmerki verða bólkabýtt

## Stjórn á stevnuni

Kappingarleiðari er NN or stevnuskrivari NN.
Yvirdómari er NN og startari NN.

## Dómarar

Føroysku feløgini skulu møta við fylgjandi fólki til uppgávurnar sum tíðtakarar, vendidómarar og svimjidómarar: HS, SuSvim og Ægir 5 fólk til hvønn stevnupart; FLOT, FS og Reysti 2 fólk til hvønn stevnupart. Nøvnini skulu sendast til ssf@ssf.fo í seinasta lagi **fríggjadagin 23. apríl 2021**.

## Tilmeldingar

Tilmeldingarfíla í Grodan-sniði er send við hesi innbjóðing til øll feløg. Tilmeldingar skulu sendast í Grodan-sniði til ssf@ssf.fo í seinasta lagi **hósdagin 15. apríl 2021**.

Hvør felag fær sínar tilmeldingar aftur sum innlisnar í stevnuforritið, dagin eftir at tær eru móttiknar, at kanna og um neyðugt rætta fram til og við **fríggjadagin 23. apríl 2021**, tá ið læst verður endaliga fyri tilmeldingum og møguligum útskiftingum.

## Tilmeldingartíðir

Tilmeldingar skulu vera við tíðum svomnar í hesum kappingarárinum, tvs. síðani **1. september 2020**. Um svimjarin ikki hevur nakra tíð, so kann meldast til við ongari tilmeldingartíð.

ATLANTIC AIRWAYS

## Luttøkugjald

Luttøkugjaldið er kr 25 fyri hvønn start hjá einstaklingi og kr 100 fyri hvønn start hjá liðsvimjing, fram til og við **hósdagin 15. apríl 2021**; og síðani kr 100 fyri hvønn start hjá einstaklingi og kr 400 fyri hvønn start hjá liðsvimjing, fram til og við **fríggjadagin 23. apríl 2021**.

SSF ger upp luttøkugjøld fyri svimjarar og liðsvimjingar hjá feløgunum, at gjalda í seinasta lagi **mikudagin 28.apríl 2021** til Svimjisamband Føroya á konto 6460 - 151.845.5 í BankNordik.

Um luttøkugjald ikki er goldið tá luttakara listin skal almannakunngerast, verður felagið strikað av luttakaralistanum.

## Frámeldingar

Avmeldingar uttan læknaváttan ella væntandi uppmøting til start útloysir bót á kr 500.

## Klagur

Møguligar klagur skulu stílast til svimjinevnd SSF, við gjald á kr 700.

## Koronareglur

Hendan stevna verður fyriskipað sambært galdandi koronareglur, sí
http://www.ssf.fo/felagsskapur/reglugerd/korona-reglur-ssf/

## Beinleiðis úrslit og sjónvarping

Øll úrslit frá hesum ABMS verða at síggja beinleiðis á www.livetiming.se
Ætlanin er eisini at stroyma frá ABMS á YouTube-rásini hjá SSF

## Samband

Spurningar og viðmerkingar kunnu stílast til ssf@ssf.fo

ATLANTIC AIRWAYS